# Tuxedo Rebels ætlar at spreingja mørk

**Ein nýggjur superbólkur hevur sæð dagsins ljós, Tuxedo Rebels er ein mótmælisbólkur, ið ætlar sær at spreingja mørk við egnum løgum og tolkingum av kendum hetjum**

KONSERT
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Petur Pólson og Knút Háberg Eysturstein hava tikið seg saman í tvímansbólkin Tuxedo Rebels. Leygarkvøldið spæla teir í Hafnia Lounge. Petur og Knút eru tveir av teimum av markantastu einstaklingunum, ið eru sprotnir burturúr tónleikaumhvørvinum rundan um Losjuna í Gøtu.

### Tá M.A. Jacobsen fór til Gøtu

Gøtumaður Petur hevur í Clickhaze, Visible Fish, Kynverjum og sum einstaklingur ríka føroyska tónleikaheimin almikið. Hann er ein sterkur oddamaður, ið øll hava eina meining um. Røddin er egin og myrk. Hon hevur eina heilt serliga innilighei, ið summi hata og onnur elska. Petur hevur eisini, sum yrkjari skavað navn sítt í føroyska mentanarklettin við fýra yrkingasøvnum og eini M.A. Jacobsens heiðursløn fyri fagrar bókmentir.

### Ein gestur hjá Peturi

Leirvíkingurin Knút Háberg Eysturstein byrjaði sítt tónlistarliga yrki, sum gittarleikari í bólkum sum Marigold og avleggaranum Mary's Baby. Men tað var sum orgulleikari í Gestum, at Knút flutti seg inn í føroysku tónleikatilvitskuna. Hann hevur eisini í Marius og í einstaklingaverkætlanini hjá Peturi víst seg, sum ein sera habilan urguleikara, ið hevur átt ein stóran leiklut í heildarmyndini hjá hesum bólkum. Sum einstaklingur hevur Knút eisini roynt seg við frálíku fløguni Havsglóð. Á hesi fløgu slapp lagskrivarin Knút framat, og hesin er bæði innligur og dugnaligur. Røddin hjá Knút er eisini heilt serlig, tó á ein heilt øðrvísi máta enn tann hjá Peturi.




*Petur Pólson og Knút Háberg Eysturstein hava stovnað mótmælisbólk*

### 200 yvirtók Tjóðveldispropaganda

Petur og Knút hava samstarvað á fløguni hjá Peturi, men longu áðrenn hetta var bólkurin Tuxedo Rebels Against Danish Dominance farin at spæla til ymisk smá tiltøk kring landið. Av tí, at báðir limirnir hava verið so upptiknir av øðrum verkætlanum, er hesin bólkur ongantíð veruliga komin fyri seg. Men nú tykist vend at vera komin í.

Bólkurin hevur kutað navnið niður í minnið enn eina helvt og eitur nú bert Tuxedo Rebels. Á heimasíðuni hjá Peturi Pólsyni, sigur bólkurin, at orsøkin til navnabroytingina er, at 200 hevur yvirtikið beinleiðis Tjóðveldispropagandaina. Tí varð hesin partur kliptur burtur soleiðis, at mótmælini kunnu fevna eitt sindur breiðari.

### Fólk rýmdi av konsertum

Bólkurin spælir umframt egin løg tolkingar av løgum hjá stórum hetjum, sum Bob Dylan, Leonard Cohen, Tom Petty, Johnny Cash og U2. Á konsertunum kring landið hevur móttøkan, sum heild verið góð. Men sambært Tuxedo Rebels hevur løgurin verið dekan ov sterkur fyri summi, ið stutt sagt eru rýmd á dyr. Leygarkvøldið stendur Hafnia Lounge fyri tørn, tá hesin spennandi bólkur vitjar Havnina.

## Føroysk stuttsøga á donskum dansipalli

Undir heitinum Short Stories–Nu med havenisse leggur Dansescenen á Øster Fælled Torv í Keypmannahavn til og við leygarkvøldinum pall til dans í stuttsøgusniði. Hetta er fjóru ferð at Dansescenen leggur pall til hetta sniðið av dansiframførslu, men fyri føroyingar er hendan ferðin serliga áhugaverd, tí tann eini koreografurin er Rannvá Káradóttir og afturat sær hevur hon Kristinu Sørensen, ið dansar saman við Rannvá og Seke Chimutengwende úr London.

Temaði á hesi stuttsøgudansiframførslu er kolonihavin, og tí verur nógv gjørt fyri at skapa júst hesa kenslu, við hindbærsodavatn, kaffi og kokosmakrónum í steðginum.

Umframt Rannvá Káradóttir eru koreografarnir Odef Graf, Kirstine Kyhl Andersen, Helen Saunders og Kasper Daugaard Poulsen.

Sýningarnar byrja kl. 20 hvørt kvøld

**nud**

## VIÐMERKINGAR

# Nassa tú bara úr Mentanargrunninum Carl J

ÓLAVUR Í BEITI
Rithøvundur



**Mær tørvar ikki pening fyri at skriva eina bók, tað er ongantíð drívmegin hjá høvundi við gávum**

Nú var hann so kroystur Carl J Jensen, at hann stakk høvdið undan kavi, so bæði skalli og hattur komu undan, rotmagi við. Og hevur eina fjantuta og viðvenda viðmerking í Dimmu, og sigur nú í sínum sjálvhálovandi hjálparloysi, at øll skulu fáa úr Mentanargrunninum, eisini tey gávuleysu!

Men í Fimmaranum skilti hann ikki myndina við bommpakkanum hjá vertinum! Bommpakkin var alt ov stórur ella lítil biti hjá hesum alheims høvundi at svølgja – kongabomm eru ikki fyri hann!

**Rakreyv**

Eg havi ongantíð funnist at, at eg ikki fái úr Mentanargrunninum! Bara ein lítil rætting til Carl J Jensen! Klári meg uttan áralangar starvslønir úr Mentanargrunni Landsins! Sovorðin nassari eri eg ikki! Og heldur ikki rakreyv!

Og hartil skal eg eisini siga, at tað er ikki peningur, sum fær meg at skriva, og heldur ikki peningur, sum gevur mær hugkveiking!

So er tað eisini sagt!

**Gávuloysi**

At kalla fólk gávuleys, tað er at fara nakað langt! Sovorðið kjak havi eg ongan hug at vevja meg í! Men har trívist Carl J Jensen ivaleyst, sum skilst á hesi fjákutu og hjálparleysu viðmerking, hann hevur í Dimmu!

So nassa tú bara úr Mentanargrunni Landsins, har trívist tú væl!

## Marknaðardagur í SMS

**Komandi fríggja- og leygardag fer Torgið í SMS at hýsa einum marknaði, sum flestu handlarnir í sølumiðstøðini standa fyri**

MARKNAÐUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan verður sjálvandi um tilboð av ymsum slag, men sum nakað nýtt fyri føroyingar, verður nú eisini legalt at "prutta" um prísirnar, eins og gjørt verður á torgum, sum vit einamest seta í samband við ferðir sunnaneftir.

Torgið verður eisini shinað nakað upp á degnum, verður sagt. Serstøk café verður skipað, og bólkurin. the Dreams, fara eisini á pallin at spæla nakrar av føroysku tónleikaperlunum, sum hava sett sín dám á føroyska tónleikasøgu.

Marknaðurin letur upp fríggjamorgunin klokkan 10.



*Heldur enn harða rokkin, sum fólk hava hoyrt á MTV, fara the Dreams hesa ferð at framføra fleiri av meira ella minni klassiskum føroysku tónleikaperlunum*

Illur???
Sig tína meining í Sosialinum
